Starvslýsing



✓ Álítandi
✓ Kreaktivur
✓ Søluágrýtin
✓ Royndur
✓ Søluágrýtin
✓ Sjálvstøðugur

Finnir tú hesar eginleikar á tínum C.V. og hevur tú hug at arbeiða í einum fjølbroyttum og mennandi umhvørvi, vóna vit at tú sendir eina skrivliga umsókn við ummælum, C.V og øðrum til okkum

Vit eru eitt væl etablerað handilsvirkið á Hálsi, ið bæði er heilsøla og smásøla, ið sóknast eftir einum nýggjum starvsfelaga. Arbeiði fevnir um alla vanliga handlisrøkt, umframt eru góðir møguleikar fyri víðari menning innan smásølu, heilsølu, innkeyp o.a.. Tann ið settur verður, má hava góð samstarvsevni og kemur at arbeiða í einum dynamiskum felagskapi.
Hevur tú spurningar til eitthvørt, vinarliga ring til Bjørg Dam á tlf. 266777.

Thomas Dam á Hálsi
HÚSGØGN · LEIKUR · NÁTTÚRUDEILD · HEILSØLA
HEYKAVEGUR 3 · TLF. 31 14 00



# Bilar til sølu

Vit hava nakrar góðar, brúktar leigubilar til sølu.
Bilarnir eru mvg skrásettir.

5 Opel Astra 1.6, bensin, árg. 03.05.2001
1 Ford Focus Ambi Plus 1.8 Tdi, árg. 01.03.2001
1 Ford Focus Ambi Plus 1.8 Tdi, árg. 13.06.2001
1 Ford Mondeo Trend Stw. 2.0 Tdi, árg. 19.04.2001
1 Nissan Terrano II, 2,7 Dti, Jeepur, 7 setur,
árg. 06.01.1999

*Ring og hoyr nærri.*

**Herz Føroyar**
Hoydalsvegur 17
Postboks 3225
FO-110 Tórshavn
Tlf. 340042 ella 213546



# Línuskip til sølu

Um hóskandi boð fæst er línuskipið M/S Kvikk til sølu.

Boð kunnu eisini gevast uppá P/F Kvikk.

Felagið tilskilar sær rætt til at velja millum tilboðini ella onki at taka.

**P/F Kvikk**
Box 258 · 700 Klaksvík · Tlf. 45 75 53


# Fólkaflokkurin í Eysturoynni

Fundur verður á Restaurant Muntra í Fuglafirði týskvøldið 4. november 2003 kl. 19.30.

Jacob Vestergaard, Jógvan á Lakjuni og Óli Breckmann vera við.

**Eysturoyar Fólkafloksfelag**


# Hús í DK til sølu



Hús, 10 km frá Vejle, 72 fermetrar + útbygningur á 14 fermetrar, fullur kjallari, dupult garaga. Grundøkið er 800 fermetrar.
Húsini standa í friðarligum umhvørvi og sera sentralt.

**Tlf. 423177**


# Kunngerð

**frá útskiftingarnevndini fyri Gjáar bygd**

Á fundi 22. oktober 2003 hevur útskiftingarnevndin gjørt úrskurð um býti av haganum Dalur og Fløtur.

Eftir kap. 9 í útskiftingarlógini frá 27. mars 1939 kunnu útskiftingin og úrskurðurin hjá útskiftingarnevndini kærast til yvirútskiftingarnevndina, og er kærufreistin 3 mánaðir frá 31. oktober at rokna. Kærufreistin er úti 31. januar 2004.

Møguligar kærur skulu vera skrivligar og stílast til Sorinskrivaran, C. Pløyensgøta 1, Tórshavn, ið er formaður í yvirútskiftingarnevndini.

Útskrift av úrskurðinum liggur frammi á Matrikulstovuni í Tórshavn til kærufreistin er úti.

*N. v.*
**Bjarni Hansen**
**útsk. form.**


# Bilur til sølu

**IVECO 75 E14 Euro Cargo**

Lastbilur við alukassa og lift, árg. 98.
Bilurin er vælhildin.

Áhugað kunnu venda sær til
**Tlf. 225130 - 455161**



# Teknikari

Søkt verður eftir verkfrøðingi, byggifrøðingi ella tekn. assistenti við hollum teldukunnleika og góðari venjing í AutoCAD/Point nýtslu. Hevur tú royndir innan okkara virkisøki, sum er vantveiting, kloakering og HVS-installatiónir, er tað er fyrimunur.

Send eina umsókn helst áðrenn hálvan november.

**Martin E. Leo Sp/f**
Ráðgevandi verkfrøðingar · tlf. 311588 · fax 315488
Tórsgøta 24 · postbox 1034 · 110 Tórshavn
t-post: martin@mel.fo



# Bilur til sølu



Toyota 2.0 TD vøruvognur. Koyrt 73.000 km. Felgur v/píkum fylgja við.

**Tlf. 22 51 67**



# Bilur til sølu



SUBARU LEGACY 2.0 i árg. 96/97 til sølu. Bilurin er sera væl hildin og hevur koyrt 104.000 km. Vetrardekk á felgum fylgja við. Ring

**Tlf. 260116**


# Hjálpargrunnurin fyri óarbeiðsførar fiskimenn

Umsóknarbløð til grunnin fáast við at skriva til: **Postboks 2114, FO-165 Argir**, ella at ringja á tlf. 31 60 89 (svarar eftir arbeiðstíð) ella leggja boð á telefonsvararan.

***Umsóknir til hjálpargrunnin mugu vera grunninum í hendi í seinasta lagi týsdagin 9. desember 2003.***

**Hjálpargrunnurin**


# Mercedes 300 E Diesel

frá '95, í sera góðum standi, til sølu.

Tlf. **442057** ella **220257**
best eftir kl. 17.00





NetStarv

**KT - útbúgvingin hjá ALV byrjar 5. januar 2004.**

**Útbúgvingin tekur 16 mánar og verður á Hotel Runavík.**

• Málbólkur
Fysisk avlamin fólk, sum hava eina miðnáms og/ella víðari útbúgving ella aðrar javnlíkar royndir. Avlamin fólk, sum hóast sítt brek hava góð útlit til at røkja eitt arbeið innan eitt nú KT-vinnuna.

• Starvenjing
Útbúgvingin er verklig. Umleið helvtin av tíðuni verður skipað á eini fyritøku.

• Endamál
Málrætta útbúgving til óstuðla arbeiði á ávísari fyritøku, t.d. "udvikler", "designer" ella "systemkonsulent"

• Innihald
Eftir gjølla gjøgnumgongd skulu luttakarnir gera seg serkønan á ávísum økið, t.d. databasum, design og interaktivitet. Útbúgvingin verður skipa við skiftivís undirvísing og starvsvenjing.

**Umsókarfreistin er 17. november 2003.**

**Áhugaði kunnu venda sær á tlf.: 35 00 70 ella 21 11 35.**

Tlf.: 35 00 70
www.alv.fo






pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 4484


Boðað verður til

# eykaaðalfund og kjakfund

**leygardagin 15. november kl. 10.00**
**í hølum felagsins Tjarnardeild 7, 100 Tórshavn**

Uppskot til kjakfundin skulu vera skrivstovu felagsins skrivliga í hendi í seinasta lagi mánadagin 10. november.

**Føroya Arbeiðarafelag**


heystið - veitslur
Restorffs

Nú kemur **heystið**, ræst kjøt, nýggj eplir, røtur og so allar veitslurnar hjá ítróttarfeløgum, bindiklubbum, brúdleyp, rundir føðingardagar, veðraball, haruskjóting og so sjálvandi jólaborðhaldini.

Vit hjá **Restorffs** eru altíð tilreiðar við einum góðum tilboði. Vit koyra út, avheinta, lána gløs ókeypis og leggja lag á. Hjá okkum er ongin veitsla ov lítil og ongin ov stór og vit garantera 24 tímars tænastu og stand by.



tlf. 31 47 28
email : restorff@post.olivant.fo
*Tit ringja – vit bryggja*
Restorffs



# Starvslýsing

Søkt verður eftir røktarstarvsfólki til Korndalsbýlið á Eiði.

Talan er um tíðaravmarkað starv fram til 1. apríl 2004 í náttarvakt við einstøkum kvøldvaktum, 25 tímar um vikuna.

Ynskiligt er, at tú ert útbúgvin heilsuhjálpari ella heilsurøktari.

Nærri fæst at vita um starvið frá varaleiðaranum á tlf. 422570.

Umsóknarfreist er 14. november.

Skrivlig umsókn við møguligum prógvum verður at senda til
**Heimarøktin**
**Vágar/Norðstreymoy**
varaleiðarin
Fo-400 Oyrarbakki


Sosialurin
www.sosialurin.fo